# Ferðsla uttan íhald

**Starvsfólkið hjá Vágatunlinum hava havt so nógv at gjørt, at stundir hava ikki verið til kanna eftir, hvussu nógvir bilar hava koyrt gjøgnum tunnilin**

VÁGATUNNILIN
*Heri á Rógvi*



*Fyrstu dagarnar hevur ikki staðið á, at fáa fólk at koyra undir sjónum til og úr Vágum*

Áhugin fyri at koyra til og úr Vágum gjøgnum Vágatunnilin hevur verið ovurstórur, síðani tunnilin lat upp mikudagin. Somuleiðis hevur arbeiðsbyrðan hjá starvsfólkunum hjá P/F Vágatunnilinum verið so stór, at tað hevur ikki verið hugsingur um at greiða á samlaða bilatalinum fyrstu dagarnar, greiðir stjórin, Dávid Reinert Hansen, frá. Tað er kanska óneyðugt at skriva tað, men ferðslan til og úr Vágunum hevur ongantíð verið størri og meiri umfatandi enn hesar seinastu dagarnar.

Hetta skyldast ikki minst, at týsdagin og mikudagin var ókeypis at ferðast eftir gjaldsvegnum millum Streymoynna og Vágoynna.

Dávid Reinert Hansen upplýsir, at teir hava teljarar, sum kunnu siga teimum talið á ferðandi gjøgnum tunnilin, men stundir hava ikki enn verið at fáa greiðu á hesum tølum, tí arbeiðsbyrðan sum sagt hevur verið so stór hjá starvsfólkunum hjá P/F Vágatunlinum.

Orsøkin er tann, at P/F Vágatunnilin í løtuni verður niðurringdur av fólki, sum ætla at ogna sær kubban. At avgreiða øll hesi er í løtuni ein møtimikil uppgáva hjá starvsfólkunum, upplýsir Dávid Reinert Hansen.

### Syndararnir

Í løtuni eru ávísir trupulleikar við sjálvvirkandi gjaldstøðini við tunnilsmunnan á Vágalandinum. Nógv fólk fáa heldur ikki teirra kubba fyrr enn eftir høgtíðina.

Hetta gevur kanska summum hug at royna eydnuna og snýta seg ígjønum. Men hetta er ikki rættiliga ráðiligt, tí vidoeftirlitið hjá Vágatunlinum er fult virkandi.

Skipanin virkar á tann hátt, hvørja ferð eitt akfar fer ígjøgnum uttan at gjalda, so skrásetur telduskipanin hjá Vágatunlinum hetta, og skipanin finnur videoupptøkuna av hesum fram.

Dávid Reinert Hansen sigur, at teir kanna so, um hetta skyldast einum feili við skipanini ella um fólk royna at snýta.

Er tað so, at onkur roynir at snýta, so verður nummarplátan lisin, og umvegis Bileftirlitið fær viðkomandi eigari fráboðan um mistakið og kravboð um gjald fyri koyringina.

# NCC ruddar upp



*NCC, sum hevur gjørt sjálvan Vágatunnilin, manglar bert at fáa teir síðstu smálutirnar frá hondini*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Hjá NCC restar bert upprudding og onkrir smáir snøklar**

VÀGATUNNILIN
*Heri á Rógvi*

NCC, sum hevur gjørt sjálvan tunnilin fyri P/F Vágatunnilin, manglar bert at rudda upp, so eru teir lidnir við verkætlanina Vágatunnilin.

Somuleiðis skulu onkur heilt lítil arbeiði gerast.

– Tað eru sovorðnir snøklar, sum altíð eru í tílíkum arbeiðum, sigur Herman Lindberg frá NCC.

Hesa vikuna og næstu viku fara fólk frá NCC at rudda upp. Síðani verður farið í jólafrí, og tað, sum so er eftir, verður so tikin eftir høgtíðina einaferð.

Hóast NCC nú pakkar saman í sambandi við Vágatunnilin, so hevur fyritøkan ongar ætlanir um at gevast í Føroyum.

– NCC ætlar sær at halda fram í Føroyum og bjóða upp á tey arbeiði, sum vit halda vera áhugaverd, sigur Herman Lindberg.

Dávid Reinert Hansen váttaði fyrr í vikuni, at NCC er inni í myndini til at gera Norðoyatunnilin, nú bíðað verður eftir politisku viðgerðini. Men hetta vil NCC sjálvt ikki gera nakrar viðmerkingar um.

Alt annað arbeiði, sum er eftir í sambandi við tunnilin, er arbeiði hjá øðrum veitarum enn NCC, m.a. ymiskt elektriskt arbeiði.

Nú arbeiðið er liðugt, er Herman Lindberg eisini væl nøgdir við arbeiðið.

– Vit eru ongantíð heilt nøgdir, men sum heild eru vit væl nøgdir við arbeiðið, sigur Herman Lindberg.



# Skipafelag Føroya undir stóra bygging

**- Endamálið við byggingini hjá Skipafelagnum er at fáa størri rásarúm á havnalagnum - Beta har suðuri, sum feløgini í dag hava sítt virksemið og Skipafelagið har norðuri á nýggja havnalagnum, sigur Rodmundur Nielsen, býráðsformaður**

BYGGING
*Vilmund Jacobsen*



*Tað verður rúmligari hjá Skipafelag Føroya og P/F Beta, tá ið Skipafelagið flytir norður á nýggja havnalagið. Ætlandi byrjar byggingin til várs.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Skipafelag Føroya og P/F Beta, sum eiga bygningar á havnalagnum í Saltangará, fáa í næstum betri umstøður og størri rásarúm til sítt virksemi.

Skipafelagið fer at byggja ein nýggjan og stóran bygning á nýggja havnalagnum norðanfyri, sonevndu oljuhavnini, og samstundis fær Beta betri møguleikar, har felagið í dag húsast við sínum virksemi undir liðini á Skipafelagnum.

Bæði feløgini hava stórt virksemi og hava brúk fyri meira plássi. Tí er ætlanin, at Beta eisini skal húsast í onkrum at verandi bygningum hjá Skipafelagnum, samstundis sum Skipafelagið fær stór og nýggj hølir.

### Byrjar til várs

Rodmundur Nielsen, býráðsformaður, sigur, at Skipafelagið hevur fingið formelt byggiloyvi til bygningin, og ætlandi verða fyrstu formarnir settir upp til várs.

- Endamálið við bygginini hjá Skipafelagnum er, at bæði feløgini skulu fáa størri rásarúm á havnalagnum - Beta har suðuri, sum feløgini í dag hava sítt virksemið og Skipafelagið á nýggja havnalagnum, sigur hann.

Spurdur, um annað virksemi ella aðrar byggingar eru í umbúna á nýggja havnalagnum, sigur Rodmundur Nielsen, at ætlanin, sum liggur nærmast, er byggingin hjá Skipafelag Føroya.

# Havbúnaðarfelagið á fundi við ES

**- Nakað inn í komandi ár verður væntandi greitt, hvar málið um dumping av laksi endar, sigur Vinnuhúsið**

DUMPINGÁKÆRAN
*Vilmund Jacobsen*



*Umboð fyri Havbúnaðarfelagið í DG Trade í Brússel*

Síðst í november vóru umboð fyri Havbúnaðarfelagið á fundi við nevndina hjá ES, sum viðger dumpingmálið móti føroyskum laksaalarum. Á hesum fundi løgdu føroysku umboðini saman við sakførara sínum í Brúsell fram sína verju í málinum.

### Gongdin

Tað var 18. juli í ár, at ES kunngjørdi, at dumpingákæra var reist móti Føroyum og Chile.

- Virkini, sum vóru útvald til nærri kanning, lótu tilfar sítt inn fyrst í oktober, og ein mánað seinni vóru 2 umboð frá Trade Defence, ið er tann deildin í DG Trade, sum viðger málið, í Føroyum og grannskoðaðu tær frágreiðingar, sum virkini høvdu latið frá sær.

Vinnuhúsið sigur, at Havbúnaðarfelagið í oktober læt eina skrivliga frágreiðing til ES, har felagið lýsti síni sjónarmið viðvíkjandi ákærunum um, at føroyingar hava dumpað og harvið volt laksaframleiðarum í ES skaða.

### Á fundi við ES

- Seinasta, sum so hent er í málinum er, at umboð fyri Havbúnaðarfelagið síðst í november vóru á fundi við nevndina, sum viðger dumpingmálið, og har vóru høvuðstættirnir í verjuritinum framlagdir.

Endamálið við fundinum var at tryggja sær, at nevndin, sum viðger dumpingmálið, hevur skilt tey sjónarmið, sum Havbúnaðarfelagið ynskir at føra fram.

- Nakað inn í komandi ár verður væntandi greitt, hvar málið um dumping av laksi endar, sigur Vinnuhúsið.

## Útróðrarbátar hava rokfiskiskap

**Seinastu tíðina hava útróðrarbátar á Sandi fingið upp ímóti 300 pundum á stampin**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tað er ikki smávegis, sum útróðrarbátarnir á Sandi hava fingið nógvan fisk í seinastuni, tá ið roynandi hevur verið.

Mikudagin hevði Antares heili 14.000 pund, og dagin fyri høvdu teir 12.000 pund.

Tann fyrra dagin settu teir 42 stampar; so hetta er rættiligur útróður. Vit hava ikki frætt, hvussu nógvar stampar teir høvdu mikudagin.

- Tað hevur viðrað illa, men tá ið roynandi er, hevur útróðurin verið ógvuliga góður, siga tey á Sandi.

Lagt verður aftrat, at bátar javnan hava fingið upp ímóti 300 pundum á stampin.

- Umleið tveir triðingar av veiðini er gráur fiskur; restin er hýsa. Fiskurin er misjavnur til dygdar, men væl nýtiligur í framleiðsluni.

### Eysturbúgvin fullur

Mikudagin landaði trolarin, Eysturbúgvin á Sandi; teir vóru fullir undir lúkurnar. Veiðan var smáttfallandi upsi.

Á Sandi vænta tey partrolararnar, Skansatanga og Research, í dag ella mánadagin.

Bæði á Sandi og í Skopun hevur nógv fiskaarbeiði verið seinastu tíðina, verður sagt úr oynni.